# Framúr góð byrjan hjá Kelduni

**Um 600 fólk høvdu leitað sær til Skálafirðar á fyrsta møtið, sum varð hildið fríggjakvøldið í nýggja samkomuhúsinum hjá Kelduni. Alt vikuskiftið var at kalla ein stór veitsla, og hevði samkoman skipað fyri fleiri ymiskum fundum fyri bæði stórum og smáum**




*Ljóðviðurskiftini í Kelduni eru av teimum allarbestu - og tað var, sum vildi takið lyfta seg omanav, tá lovsongskórið saman við teimum 600 fundarfólkunum skóru í at syngja: "Her er títt hús, títt heim, vit fagna tær í dag"*

REPORTASJA
*Orð og myndir:*
*Rúna Sivertsen*
*runa@sosialurin.fo*

Klokkan var farin nakrar minuttir av átta, tá eg fríggjakvøldið kom inn í forhøllina í nýggja samkomuhúsinum hjá Kelduni í Skálafirði.

Har var stúgvandi fult av fólki, og við dyrnar inn til sjálvan salin stóðu møtivertir og bjóðaðu vælkomin.

Fólk vóru í veitsluhýri, og gleðin lýsti av andlitunum á bæði børnum og vaksnum - og tað var jú einki at siga til, nú hetta snotiliga húsið, sum hevur staðið í gerð í fleiri ár, endiliga kundi takast í nýtslu.

Tað var ein einastandi kensla at koma inn í sjálvan møtisalin, sum er nakað heilt fyri seg í føroyskum samkomuhøpi. Eg haldi ikki, eg taki munnin ov fullan, tá eg sigi, at samkoman í Skálafirði hevur reist eitt satt tempul.

Ljóðviðurskiftini í salinum eru av teimum allarbestu - og tað var, sum vildi takið lyfta seg omanav, tá lovsongskórið saman við teimum 600 fundarfólkunum skóru í at syngja: "Her er títt hús, títt heim, vit fagna tær í dag".

Um ein hægri megi var uppi í leikinum, kunnu vit bara gita, men hvussu var og ikki, kom danski prædikumaðurin, sum var biðin at tala á fyrsta møtinum, ikki vegin fram, tí flogfarið fekk ikki lent í Føroyum.

Tí fekk samkomuleiðarin Pauli Høj bert ein tíma at fyrireika seg til hesa fyrstu prædiku sína í nýggja húsinum. Men hesum kom hann væl frá, og bar fram ein sannførandi boðskap til fundarfólkið.

– Eg havi ikki fingið tíð at fyrireika meg rættiliga, og nú eri eg fullkomiliga bundin av Gudi, segði hann, tá hann byrjaði talu sína.

Við endan á møtinum varð bjóðað til forbøn, og vóru tey fleiri, ið nýttu høvið at koma fram.

Eftir møtið var ein kaffimugur at fáa, og fólk úr øllum samkomum hugnaðu sær og gleddust um hetta stásiliga hús.

## Familjumøti

Millum mongu tiltøkini í vikuskiftinum var eisini familjumøti sunnudagin, og var salurin aftur stúgvandi fullur av børnum og vaksnum. Boðskapurin um Jesus varð flættaður inn í sang, spæl og dans á ein sera skemtiligan hátt, sum helt børnunum árvaknum hvørja løtu, møtið vardi.

Tá familjuløtan var av, fingu børn og vaksin saft og pylsubreyð.

Leygarkvøldið var stórt ungdómstiltak undir heitinum Awake, har tey ungu sanniliga fingu bæði eina tónleikaliga og andaliga uppliving. Í blaðnum í morgin fara vit við orðum og myndum at siga frá ungdómsmøtinum.

Á heimasíðuni, www.keldan.fo, finnast upplýsingar um Kelduna. Har kanst tú eisini lesa um visjónirnar fyri samkomuna, har millum annað stendur:

"Okkara mál er at náa menniskju við evangeliinum um Kristus og hansara kraft, so menniskju kunnu verða frelst".

Nú hetta stásiliga og serstakliga væl útgjørda húsið stendur liðugt, kunnu vit samanbera tað við eitt nýtt fiskifar og siga, at nú er upp til hin almáttuga at signa verkið.



*- Eg havi ikki fingið tíð at fyrireika meg rættiliga, og nú eri eg fullkomiliga bundin av Gudi, segði samkomuleiðarin, Pauli Høj, tá hann byrjaði talu sína. Danin, sum skuldi tala á fyrsta møtinum í nýggju Kelduni, kom ikki fram, tí flogfarið lendi ikki*



*Henda fitta gentan var millum tey mongu elskuligu børnini í Kelduni sunnudagin*







*Á familjumøtinum sunnudagin, varð boðskapurin um Jesus flættaður inn í sang, spæl og dans á ein sera skemtiligan hátt, sum helt børnunum árvaknum hvørja løtu, møtið vardi*



# Smyril Line til reiðar at kappast um farmin

**Smyril Line valdi at varðveita kappingina um farmaflutningini á Norðuratlantshavi heldur enn selja seg til Eimskip fyri einhvønn prís. Tað ger leiðslan í Smyril Line greitt, eftir at dúgliga hevur verið gitt, í hvussu stóran mun Smyril Line mundi vera við í myndini, tá Eimskip keypti Skipafelagið. Eimskip samráddist við føroysku feløgini samstundis og ætlaði helst at yvirtaka allan farmamarknaðin á Norðuratlantshavi**

TÍÐINDASKRIV
*Smyri Line*



Tað er betri fyri bæði prísleguna í farmaflutninginum og fyri Smyril Line sjálvt, at felagið ikki lat Eimskip yvirtaka farmadeildina hjá Smyril Line fyri ein einhvønn prís.

Tað er niðurstøðan hjá leiðlsuni í Smyril Line, eftir at felagið í meira enn eitt hálvt ár samráddist við Eimskip um samstarv og møguliga sølu av farmadeildini til íslendska felagð, sum tók upp tingingar við Skipafelagið, samstundis sum veruligar samráðingar vóru við Smyril Line.

Longu í januar í ár umrøddu Eimskip og Smyril Line møguleikan at samstarva um íslendskan farm, soleiðis at Eimskip kundi keypa dekspláss umborð á Norrönu til farm til og frá Íslandi. Men tá nýggjur stjóri tók við í Eimskipum í mai, vildi hann heldur keypa farmadeildina hjá Smyril Line. Fyri Smyril Line kundi hetta verið ein góður handil, um rætta upphæddin kom á borðið, og tí skrivaði Smyril Line tíðliga í summar undir eina avtalu við Eimskip um, at í seinasta lagi 15. august skuldi vera greitt, hvørt ein handil skuldi spyrjast burturúr ella ikki.

## Skipafelagið og Smyril Line

Stutt eftir - í juni - bankaði Skipafelagið á dyrnar hjá Smyril Line og segði seg vera til sølu. Men Smyril Line var í samráðingum við Eimskip og var tí meira sinnað fyri eini sonevndari føroyskari loysn, sum bar í sær samstarv millum tey bæði føroysku flutningsfeløgini. Fyrstu viku í juli var aftur fundur millum Skipafelagið og Smyril Line, har Skipafelagið einaferð enn bjóðaði Smyril Line at keypa felagið. Smyril Line ynskti í hesum sambandi at kanna roknskapin hjá Skipafelagnum nærri, men umboðini hjá felagnum boðaðu í staðin frá, at felagið hevði fingið eitt tilboð upp á meira enn 100 milliónir krónur, og spurdu um Smyril Line hevði eitt betri boð.

Smyril Line hevði ilt við at trúgva hesum og helt framvegis samstarv vera røttu loysnina. Samstundis var leiðslan í Smyril Line vorðin greið yvir, at fleiri veruliga samráðingar fóru fram á farmamarknaðinum samstundis.

## Avtalu um samráðingar

Smyril Line valdi at halda seg til skrivligu avtaluna við Eimskip um samráðingarnar um farmadeildina, og ein samráðingarfundur var við Eimskip tann 22. juli, tá Skipafelagið tvær ferðir hevði bjóðað Smyril Line at keypa seg.

Á hesum fundinum skjeyt Eimskip upp, at Smyril Line og íslendska felagið saman gjørdu eitt nýtt farmaflutningsfelag við heimstaði í Føroyum, har báðir partar skuldu eiga 50 prosent. Smyril Line tók ikki støðu til hendan spurningin, og framvegis vóru 24 dagar eftir til samráðingaravtalan fór úr gildi tann 15. august.

Men Smyril Line hoyrdi at kalla onki aftur frá Eimskipum, sum felagið helt seg hava veruligar samráðingar við um farmadeildina. Sum góður siður er, boðaði Smyril Line 11. august í skrivi Skipafelagnum frá, at keyp ikki kom upp á tal, men at samstarv framvegis hevði áhuga.

Framhaldandi hoyrdist onki frá Eimskipum, men 17. august bórust so tíðindini um, at Eimskip hevði keypt Skipafelagið. Hetta kom rættiliga óvart á bæði stjórn og nevnd í Smyril Line, sum bíðaðu eftir einum nýggjum samráðingarumfari við Eimskip.

## Føroyska loysnin

Beint eftir, at handilin millum Skipafelagið og Eimskip var farin fram, bóðu bæði stjórin í Skipafelagnum og stjórin í Eimskipum um fund við Smyril Line. Eimskip boðaði har frá, at felagið framvegis var sinnað at keypa farmadeildina hjá Smyril Line.

Men sæð frá einum handilsligum sjónarhorni hjá Smyril Line legði Eimskip ongantíð rætta prísin á borðið. Smyril Line valdi tískil heldur at taka kappingina upp við nýggja farmaflutningsfelagið hjá Eimskipum. Smyril Line er sannført um, at felagið í komandi árum kann vinna væl meira av peningi við farmaflutningi, enn Eimskip hevði viljað latið fyri farmadeildina hjá Smyril Line.

Sæð frá einum samfelagsligum sjónarmiði var hetta eisini røtt avgerð, tí farmaleiðirnar vera framvegis fjølbroyttar, og kappingin skuldi harumframt tryggja brúkarunum bestu sømdir.

Nýggjar tíðir eru á farmamarknaðinum, og Smyril Line er í ferð við at menna farmadeildina og laga hana eftir nýggju marknaðarstøðuni.

KAUPTHING
Virðisbrævameklarafelag



Vika 37, 2004
www.kaupthing.fo

# Rentuhækkingar aftur á dagsskránni

MARKNAÐARRÁK

Farna vika er fyrsta vikan í longri tíð, har oljan ikki hevði høvuðsleiklutin. Orsøkin var, at fríggjadagin varð sera týdningarmikla mánaðarliga arbeiðsmarknaðarfrágreiðingin úr USA kunngjørd. Fíggjarmarknaðirnir hava bíðað eftir hesi frágreiðing í ein mánaða. Frágreiðingin gjørdist bjørt. Serliga tí at talið av stovnsettum arbeiðsplássum í juli varð dagført úr 32.000 í 73.000. Talið fyri august varð meira neutralt, tí 144.000 arbeiðspláss vóru sett á stovn, meðan væntaða talið var 150.000.

Eftir tvær vánaligar frágreiðingar, metur Kaupthing at henda heldur bjartari frágreiðingin ger, at amerikanski tjóðbankin (FED) við størsta sannlíkindi fer at hækka teirra leiðandi rentu á fundinum 21. septembur úr 1,50% í 1,75%. FED fer einans at broyta meting um teirra rentustig, um prísvakstrartølini, ið verða kunngjørd 16. septembur, lækka munandi.

Hósdagin hevði evropiski miðbankin (ECB) rentufund. Sum væntað varð leiðandi evropiska rentan ikki broytt. Í samband við fundin segði bankin, at tey vænta at framgongdin í evropiska búskapinum heldur fram og at búskapar- og prísvøksturin sum fráliður fer at hækka. Nýggja metingin fekk lánsbrævarentur um okkara leiðir at hækka, og sum so økir nýggja metingin um sannlíkindið fyri at evropiska leiðandi rentan verður hækkað um ársskiftið.

Fá búskapartøl verða kunngjørd hesa vikuna, men mikudagin heldur stjórin í FED, Alan Greenspan, røðu um m.a. búskaparligu útlitini. Væntað verður, at Greenspan fer at endurtaka, at FED fer at hækka leiðandi rentuna í samsvari við búskaparligu framgongdina. Um Greenspan ikki togar nakran gekk úr ermuni, fara marknaðirnir ikki at órógvast av røðu hansara. Kaupthing væntar sostatt, at lánsbrævarentur og partabrøv fara at hækka eitt vet hesa vikuna.

Oljan hevði lítlan leiklut í farnu viku, og oljan er lækkað um 10% síðan hægsta stigið 19. august. Váði er tó allatíðina fyri, at oljuveitingin til heimin verður órógvað aftur. Hetta vil eisini órógva fíggjarmarknaðirnar. Hóast rentur og partabrøv eru hækkandi, kunnu dagar við mótrørslu tí væntast.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,66% | 0,14% |
| 5 ára lánsbræv | 3,67% | 0,13% |
| 10 ára lánsbræv | 4,51% | 0,09% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 272,9 | 1,2% |
| OMX, Svøríki | 698,3 | 1,3% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.687,5 | 1,4% |
| S&P 500, USA | 1.113,6 | 0,5% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,92 | -0,1% |
| Evru Lánsbrøv | 167,58 | 0,0% |
| Norrøn Partabrøv | 80,26 | 1,1% |
| Altjóða Vøkstur | 60,43 | 0,7% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 616,77 | -0,1% |
| EUR | 743,70 | 0,0% |
| GBP | 1.095,87 | -1,1% |
| NOK | 89,42 | 0,8% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*